LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 22/2022 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Hervør Pálsdóttir, løgtingsmanni, um navnalógina og tulkingarrætt

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvør landsstýrismaður hevur rætt at tulka navnalógina?
2. Heldur løgmaður, at tað gongur ímóti vilja Løgtingsins, um landsstýrismaðurin í mentamálum ikki gevur fólkakirkjuni boð um at skráseta børn saman við sammøðrum í kirkjubókina?
3. Ætlar løgmaður at bera so í bandi, at hesin trupulleikin verður loystur?

Svar:

Til spurning 1
Tað er landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum, ið "eigur" navnalógina, og harvið eisini tulkingarrættin.

Til spurning 2 og 3
Tað er ikki greitt, hvat ið meinast við "vilja Løgtingsins". Um við "vilja Løgtingsins" meinast við navnalógina, so er tað so, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur tulkað navnalógina og grundgivið fyri síni tulking yvirfyri Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Eg taki sum givið, at Uttanríkis- og mentamálaráðið fylgir tulkingini hjá tí, ið eigur tulkingarrættin.

Í Tinganesi, 7. september 2022

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður

Tinganes - Fo-100 Tórshavn – Faroes
Tel: (+298)306000 – e-mail: info@tinganes.fo - www.lms.fo